# Vel rætta brúðarhárið

**Saman við rætta kjólanum - og sjálvandi rætta bruðgóminum - so er hárið prikkurin yvir i'ið á stóra degnum**

Tað kann vera, at onkur heldur tað flotta brúðarhárið er nakað, ið bara er sett saman um morgunin sjálvan brúdleypsdagin, men sum tað er galdandi við brúðarkjólanum og smúkkunum, so krevur rætta brúðarhárið planlegging fyri at tryggja eina flotta og myndaklára brúður.

## Hugsa um tína hártypu

Eitt tað fyrstu, sum brúðurin má hugsa um er, hvat slag hár hon hevur og so velja brúðarhárið út frá hesum. Er hárið tunt ella tjúkt, slætt ella krúllut – tað eru treytir, ið mugu takast við í avgerðinum um háruppsetingina. T.d. um krúlluta hárið verður væl og virðiliga slættað og tað regnar á brúdleypsdegnum, kann væl henda, at vætan ger hárið ývi so brúðarhárið verður oyðilagt.

## At fáa tað rætta brúðarhárið

Tá tú hevur valt tær nakrar frisyrur, tær dámar, er næsta stigi at bíleggja ráleggingartíð hjá frisørinum. Her tekur tú nakrar myndir við tær av uppsetingum,

> **Vaska hárið dagin fyri**

sum tær dámar og biðjur frisørin um ráð og uppskot. Ein góður frisørur sigur erligt, hvat tær klæðir best og ikki, og eisini hvat riggar best at gera við tínum hárið osv. So ansa eftir um frisørurin lovar, at hon kann gera alt tað, sum tú ynskir tær.

Hevur tú eina kenslu av, at tú og frisørurin als ikki eru á bylgjulongd , so mást tú melda klárt út hvørji ynskir tú hevur og um tað ikki riggar, so bíleggja tær tíð hjá onkrum øðrum.

Tað er ikki ráðiligt at brúka brúdleypsdagin til at royna seg fram, so tryggja tær, at tú hevur funnið tann rætta at gera tær hárið og sum veit akkurát hvussu tú vilt hava tað at síggja út.

Hendan dagin finna tit eisini eina tíð til at lita og/ella klippa hárið, so tað er púra klárt til sjálvan dagin.

## So er stóri dagurin her

Endiliga kom stóri dagurin. Tú hevur bílagt tíðina hjá frisørinum og tú møtir minst tíggju minuttir ov tíðliga. Heilt erligt, ikki hugsa um at møta ov seint. Ja, tú hevur nógv á skránni hendan dagin, men at stytta um tíðina hjá frisørinum, fær hana bara til at skunda sær. Og tað verður sjálvdan væleydnað og harafturat er hon kanska vorðin í ringum lag av at bíða, so tað er sera umráðandi, at tú gevur frisørinum alla ta tíðina, hon hevur brúk fyri, so at tú fær júst tað hárið, ið fær teg til at kenna teg sum tann vakrasta í heiminum.

Og eitt afturat, sum fær frisørin í gott lag: vaska hárið dagin fyri. Tað ber ikki so væl til at seta dýggjvátt ella reint hár upp. Turt, daggamalt hár hevur meira "bit" í og er so nógv lættari at seta og heldur sær eisini betri.

Eitt seinasta ráð á vegnum er at lata teg í eina knappa-blusu, tá tú fer at seta tær hárið sjálvan brúdleypsdagin. Mong ein brúður hevur verið noydd til at klippa í

> **Minst til at lata teg í eina knappablusu**

yndisblusu ella –troyggjuna hjá sær fyri at sleppa úr henni uttan at oyðileggja flotta brúðarhárið.

## Hár og kjóli mugu hóska saman

At hava kjólan í huga, tá háruppsetingin verður vald, er enn ein máta at tryggja, at brúðurin sær so flott út sum gjørligt úr høvur í føt.



Er kjólin einkul riggar væl við einum (at síggja til) tilvildarliga elegantum hári. Ein lágur hártoppur – vanliga nevndur chignon – er stílfullur uttan at vera for nógv



Stroppaleysir brúðarkjólar koma best til sín rætt um hárið er sett upp, so royn ein eitt sindur innviklaðan stíl við defineraðum krúllum ella nøkrum penum fløkjum, so heildarmyndin riggar væl



Er nógv pynt og glimmur á kjólanum er best við eini einklari frisyru so hárið ikki kappast við flotta kjólan um uppmerksemið

*Kelda: knotforlife.com*